


*Tveir av monnunum á Eysturoyingi venja í ávíkavist Danmark og Fraklandi. Á stevnuteitinum fingu teir nøvnini, Jón tann níggjuni og Ludvík tann tíggjundi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ludvík og Jón hava verið flúgvandi

**Tað hevur ikki bilað hjá Eysturoyingi, hóast mesta venjingin higartil hevur verið á maskinum og vektum - á Glyvrum, í Danmark og í Fraklandi!**

EYSTUROYINGUR
*Jóannes Hansen*

Fyri kappingina og spenningin var tað ógvuliga kærkomið, at tað eydnaðist. Í vár ljóðaði tað, at Eysturoyingur ikki fór at verða flotaður í ár. Teir, sum síðani 1998 hava verið bulurin umborð, ætlaðu sær at gevast, og næsta ættarliðið himpraðist eitt sindur at fara umborð á 10-mannafarið.

- Vit vóru fleiri, sum høvdu gjørt upp við okkum sjálvar, at nú vóru vit givnir. Men tað varð hildið at vera ógvuliga óheppið, at báturin ikki varð mannaður. So vit gjørdu av at taka eitt tørn afturat, men tað gekk eitt sindur striltið at manna bátin. Tað var gott, at tað eydnaðist at fáa tríggjar nýggjar menn umborð, og so hevur tað víst seg, at eksperimentið við tveimum uttanlands rógvarum hevur eydnast, sigur Hilmar Sam Lamhauge, bátsformaður umborð á Eysturoyingi.

At áhugin fyri kappsróðri og Róðrarfelagnum NSÍ framvegis er stórur var sjón fyri søgn leygardagin. Væl av fólki var í neystinum á støðni á Glyvrum og fagnaði vinnarabátinum. Tey fingu suppu, og so gekk róðrarprátið væl og leingi.

Teir, sum manna Eysturoying, eru Sámal Hansen, bátasmiðurin, sum stýrir. Hinir eru frameftir Tóroddur Vang, Bogi Olsen, Jónleif Danielsen, sum er nýggjur umborð, Rógvi Poulsen, Gudmund Danielsen, sum er beiggi Jónleif og eisini er nýggjur umborð, Himar Sam Lamhauge, Eyðfinnur Bjarnastein, sum er nýggjur umborð, Lars Abrahamsen og so teir báðir á toftini, sum eru royndir rógvarar, men sum higartil í ár hava verið í støðu, sum neyvan áður er roynd í føroyskum kappróðri.

Talan er um Jón Rosenblad og Ludvík Justinussen. Jón var nógv umrøddur í vetur, tá ið hann luttók í DM í maskinrógving og seinni, tá ið hann vann FM í somu kapping. Hann hevur áður róð við Eysturoyingi og eisini Havnarbátinum.

Ludvík hevur í fleiri ár verið fastur fúsur umborð á Eysturoyingi. Nú býr hann í eitt tíðarskeið í Fraklandi, men hann rør við Eysturoyingi!

Í stevnuteitinum á Skálafjarðarstevnuni varð gjørt burturúr sjáldsomu støðuni. Tað varð kikað eftir róðrarbátinum, og hóast teir bara sóu átta rógva og teir ivaðust eina løtu, so varð staðfest, at talan var um Eysturoying. Men teir saknaðu Jón tann níggjunda og Ludvík tann tíggjunda!

- Tað er nakað um hatta. Mesta venjingin hevur higartil gingið fyri seg á maskinum og við vektum. Vit hava vant fimm ferðir um vikuna. Tríggjar ferðir hava vit vant í neystinum, og tvær ferðir hava vit verið í bátinum. Tað hava vit verið hóskvøld og fríggjakvøld. Tá hava teir báðir útisetarnir verið saman við okkum, sigur Hilmar Sam Lamhauge.

Tað vil við øðrum orðum siga, at Jón og Ludvík komu heim hósdagin undan Norðoyastevnuni, og so fóru teir av aftur landinum dagin eftir kappróðurin.

Hilmar Sam Lamhauge undirstrikar, at hetta hevur bara borið til, tí umstøðurnar í neystinum á Glyvrum eru so góðar.

- Men nú ber okkum til at venja undir meiri vanligum umstøðum. Teir báðir, Jón og Ludvík, komu heim hósdagin í síðstu viku.Nú eru teir komnir heim í summarfrí, og teir fara ikki av landinum aftur fyrrenn eftir Ólavsøku.